


## Fleiri missa starv hjá SAS

Tilsamans 49 fólk missa nú arbeiðið hjá SAS. Tað er í sølu- og marknaðardeildini, at fólk nú verða søgd úr starvi í sambandi við sparingar í nýggju Core SAS strategiini, skrivar takeoff.dk. Tað er skrivstovan í Århus, sum nú vereður niðurløgd, og 30 av teimum ansettu har fáa bjóðað annað starv í Keypmannahavn. Men SAS vil helst gera avtalur um fulla ella lutvísa uppsøgn. Sølu- og marknaðarleiðarin, Lars Bording, gavst í felagnum 1. apríl sum fylgja av afturlatingini av SAS Danmark sum sjálvstøðug eind og varð avloystur av Per Møller Jensen, skrivar Nyhedsbureauet Direkt.

# Vónini



*Hjalmar Petersen, stjóri á Vónini, og Signar Poulsen, virkisleiðari á alinótavirkinum við Norðskála*

hálvan annan seinni, og soleiðis rotera nótirnar ofta runt, sigur Signar Poulsen.

Men nær fór Vónin inn á alinótaøkið?

- Tað hevur verið síðst í 90-unum. Men vit hava gjørt kraftblokkanótir líka síðani virkið varð stovnað. Fyrsti bygningur, sum Vónin keypti, var eitt kraftblokkanótahús, sigur Hjalmar Petersen.

Hann sigur, at aktiviteturin innan pelagisku vinnuna í løtuni er so gott sum eingin.

- Pelagiska vinnan hevur lítið og einki at fiska, svartkjaftakvotan er farin niður í einki, og tey skipini, sum fiska sild og makrel, landa sína veiði í Noregi, so vit síggja lítið og einki til skipini í Fuglafirði, sigur Hjalmar Petersen.

Tað merkir so, at tað er lítið at gera á virkinum í Fuglafirði og har um vegir, so neyðugt hevur verið at skori í starvsfólkatalinum, og Vónin hevur verið noydd at sagt nøkrum fólkum upp.

### Reinsa á sjónum

Men tá ein hurð fer aftur, fer ein onnur upp, og uppgangstíðirnar í alivinnuni koma tí væl við hjá virkinum.

- Tað er púra rætt, og tað er gott at hava hetta beinið at standa á eisini. Tað, sum vit gjørdu skilagott í hesum høpinum var, at vit løgdu hesi bæði virkini saman, Garnavirkið og Vónina, tí tað vóru tvey feløg, sum kappaðust, og hvørki teirra kláraði seg. Umsetningurin í hesi vinnuni er somikið lítil, og alivinnan framleiðir ikki meiri enn 50.000 tons, og tað, sum dettur av til hetta virkið, er avgjørt ikki nóg mikið til tvey, sigur Hjalmar Petersen.

Hann sigur, at tað, at virkini eru løgd saman, ger, at tað ber til at dríva virkið soleiðis, at tað melur runt.

Enn verða allar nótirnar tiknar upp til reinsingar, men royndir hava verið gjørdar at vaska alinótirnar á sjónum.

- Royndir eru gjørdar við at seta nótirnar óimpregneraðar og impregneraðar út, og so skulu nótirnar reinsast við hátrýstspulara, sum er umleið 300 bar. Talan er um rundar skivur, sum skulu reinsa nótirnar bara við vatni. Hetta skal so gerast ofta, alt eftir gróðrinum. Er hann nógvur, skal reinsast 20. hvønn dag, sigur Sigurd Poulsen.

Enn tekur tað langa tíð og avmarkaðu royndirnar gera, at tað tekur ein dag at reinsa eina nót, men teir, sum hava størri royndir, klára tvær til tríggjar nótir um dagin.

- Men hetta skal so gerast 20. hvønn dag, og stóri trupulleikin er botnurin. Men eisini veðrið í Føroyum spælir inn, so tað hevur ikki eydnast so væl enn. Onkur ætlar tó at halda fram við royndunum, og tað ganga tvey ár, áðrenn endaliga úrslitið sæst, sigur Signar Poulsen.

### Fleiri konufólk

Vónin er sum so ikki rættiliga við í hesm royndunum, men teir fylgja kortini við.

- Tað er jú soleiðis, at impregnerað verður við kopari, os tað er ikki tað bíligasta. Einaferð í tíðini fer tað eisini at steðga við kopari, um ikki annað verða tað myndugleikarnir, sum steðga tí vegna dálking. Undir øllum umstøðum mugu vit verða til reiðar til aðrar loysnir, sigur Signar Poulsen.

Hesin parturin av virkseminum hjá Vónini hevur 15 fólk í starvi, harav tvey í løtuni arbeiða í Fuglafirði, har tey vaska nótir, hetta fyri at koma upp undan.

Vanliga eru vit 14 á Norðskála, harav tveir eru lastbilførarar, sigur Signar Poulsen.

Trol og nót verður ofta sett í samband við mannfólkaarbeiði, men á nótavirkinum við Norðskála eru ikki bert mannfólk í starvi.

- Nei, her eru eisini fleiri konufólk. Tað er ikki helvt um helvt, men vit hava fleiri konufólk, og tað hava vit havt heilt síðani 1999, og tað riggar stak væl. Tær duga jú væl at binda og brodera, og hetta arbeiðið hevur nógv við seyming at gera, so tað riggar væl, sigur Signar Poulsen.

Virkið nøktar sum er tørvin innan alinótaøkið.

- Skulu vit hava meiri at gera her á virkinum, so mugu alararnir fáa fleiri økir at seta sínar ringar út í, og tað hava teir ikki í løtuni. Men verður tað, so vænti eg eisini, at vit fáa meiri at gera her á virkinum, sigur Hjalmar Petersen.

Vinnumálaráðharrin hevur tosað um at kanna aling á opnum havi, men tað krevur sambært stjóranum á Vónini heilt aðra útgerð og kanska eisini heilt aðrar loysnir, enn tær vit kenna í dag.

Fyribils halda tey seg so til arbeiðið við at reinsa alinótir á firðunum.

- Vit arbeiða javnan longar dagar, men av tí at Vónin er so stórt, kunnu vit fáa hjálp úr Havn ella úr Fuglafirði, tá tørvur er á tí. So nú arbeiða vit átta til fýra, og tað er hvønn dag, sigur Signar Poulsen, virkisleiðari á alinótavirkinum hjá Vónini við Norðskála.



*Alinótirnar verða vaskaðar í hesum vaskitangunum við Norðskála, men Alinótavirkið hevur eisini eina framkomna vaskiskipan í Fuglafirði*



*Eftir at alinótirnar eru vaskaðar verða tær tiknar inn á virkið, har tær verða umvældar*